Sverre Midjord, valevni Javnaðarfloksins í Suðuroy, skrivar

Landsstýrismenn Fólkafloksins fara lætt um sannleikan

Á figgjarnevndarfundi nú um dagarnar var umsókn um stuðulslán til Reynsatind til viðgerðar. Tit minnast øll, at sjálvur løgmaður — hann við teimum krystallkláru loysnunum, hann við patent uppá øll vinnulig tiltøk — segði í sínari løgmansrøðu, at Reynsatindur var eitt av teimum sunnu tiltøkum, sum komu at geva aftur tað, sum sett var til.

Gamaní, øll kunnu mistaka seg, so nú er umsókn viðgjørd um kreppulán til Reynsatind.

Í sambandi við hesa viðgerð, varð spurt eftir, um samtyktin viðvíkjandi Giljanesi var fylgd, og hvussu hon royndist.

Samtyktin fyri at geva kreppulán til Giljanes var, at landsstýrið skuldi velja eitt umboð í nevndina fyri Giljanes.

Undir viðgerðini av stuðuli til NORRÖNU spurdi eg á seinasta løgtingsfundi, hvør var valdur sum umboð í Giljanesi. Annfinn Kallsberg, landsstýrismaður, svaraði, at umboðið var valt, og at løgtingið skuldi fáa at vita, hvør tað var, áðrenn tingið fór heim. Tað kom eimki navn fram, áðrenn tingið fór heim. Og nú upplýsir løgtingsmaðurin og stjórin í Giljanesi, Svend Åge Ellefsen, at eingin er valdur, og sjálvt um hann hevur biðið um at fáa at vita um hetta mál, er einki svar komið.

Um stuðulslánið er útgoldið, so er hetta gjørt ímóti samtykt løgtingsins. Hvat sigur løgmaður til hetta? Tað er so í hvussu so er krystallklárt móti samtyktini hjá Føroya løgtingi.

Á veljarafundi á Tvøroyri segði Páll Vang landsstýrismaður uppí spurning um posthús á Tvøroyri: **At Føroya landsstýri hevði ikki fingið svar frá Tvøroyarar býráð um umsókn teirra um loyvi at byggja posthús á Tvøroyri.**

Harra løgmaður, nær hevur Føroya landsstýri sent umsókn um byggiloyvi til posthús á Tvøroyri?

Tað er av avgjørdum týdningi, at løgmaður svarar hesum spurningi. Tí mær og býráðslimum á Tvøroyri fyriliggur tað eingin umsókn av slíkum slag.

Tað sum fyriliggur er, at Fa. N. J. Mortensen ella kanska stjórin í hesari fyritøku hevur ætlanir um byggjan av einum miðstaðarhúsi líkt S.M.S. í Tórshavn.

Og her er so ætlanin hjá N. J. Mortesen, at posthúsið og Føroya Banki og aðrir stovnar skulu leiga frá honum.

Páll Vang segði ósatt á veljarafundi í Trongisvági, men hann avdúkaði av óvart, at tað um umsókn frá N. J. Mortensen, er tað sama sum frá landsstýrinum, og at Føroya landsstýri er stýrt av kapitalinum í Føroyum, og ikki av teimum av veljarunum valdu persónum.

Gott at vit fingu at vita hetta í seinastu løtu.

Og svar løgmans er væntað við áhuga og spenningi.

Sverre Midjord

Teir bera brenni til Fólkaflokkin

Tað er ikki smávegis, sum Fólkafloksvongurin í Sambandsflokkinum ger um seg í hesum døgum í gomlu Dimmu. Og sum altíð hjá hesum monnum, so er tað Javnaðarflokkurin, ið stendur fyri skotum. Teir kunnu ikki annað, tí í teirra verð er Javnaðarflokkurin einasti mótstøðupartur teirra.

Dúgliga verður vístá, hvussu Javnaðarflokkurin skal vera broyttur við síni nýggju leiðslu. Vístá verður á, at Javnaðarflokkurin miðar ímóti loysingini, og so framvegis. Hóast at teir vita við vissu, at ríkisfelagsskapurin er tryggjaður við Javnaðarflokkinum.

Eisini er at siga, at Javnaðarflokkurin broytist ikki fyri tað, um fólkafloksvongur sambandsins roynir at mana fram hesa myndina.

Annars eru vit nú so von við hesa skriving: Hetta er sama plátan, sum spæld hevur verið hesi seinastu tíggju árini.

Vit, sum sitið hava í samgongu við Fólkaflokkinum í seks ár, hugsaðu og vónaðu, at Sambandsflokkurin var vorðin troyttur av sínum samgongupartnara.

Men í øllum teimum greinum, sum Fólkafloksvongurin skrivar, kemur týðiliga til sjóndar, at teir fegnir vilja halda fram í samgongu við Fólkaflokkinum. »Lige børn leger bedst«.

Sjónligt er, at høgravendi vongur sambandsins vil fyri alt í verðini hava hesa samgongu at halda fram. Sum rímiligt er, tí tað er fólkafloksvongur sambandsins politikk, ið hesir vilja reka saman við leiðara teirra, og tað hevur eydnast í fult mát at leggja byrðarnar á hini lægst løntu í samfelagnum.

Í ársfrágreiðingini frá Føroya Landsstýri stendur á síðu 163, at keypiorkan er mest fallin hjá arbeiðsfólki. Hetta hevur staðið við øll árini, sum henda samgongan hevur sitið við ræðið. Ein týðilig frásøgn um, at tey lægst løntu bera byrðarnar í dag.

Tí er inntøkan munin ódrúgvari hjá arbeiðsfólki enn bert fyri fýra árum síðani. Tað, at lønin lækkar hjá hesari stætt, ger, at bæði megu út í vinnu.

Tað tykist sum hóvligi vongurin í Sambandsflokkinum fær ikki orðið fyri seg, men hevur givið skarvin yvir.

Neyvan hevði hetta frøtt tær gomlu hóvligu sambandshetjurnar, at Sambandsfloksins orka verður brúkt til at bera brfenni til Fólkaflokkin.

Hetta gerst tú við, um tú velur hesar báðar, líka mikið hvønn. Tí fer atkvøða tín best til Javnaðarflokkin.

Jørgen Thomsen

§ 26 í ferðslulógini sigur m.a.:

Kemur tú uppí ferðsluóhapp hevur tú skyldu at:

§ — veita meiddum hjálp
§ — boða løgregluni frá ferðsluóhappinum
§ — taka lut í tiltøkum sum tryggja ferðsluna
§ — fáa ferðslutalvur og aðra merking í rættlag aftur

Hesar skyldur hava bæði sek og ósek.

RÁÐIÐ FYRI FERÐSLUTRYGD